VINNUMÁLARÁÐIÐ

# Lýsing

**Í sambandi við at Føroya Landsstýri fer undir at einskilja fyritøku landsins, vil Vinnumálaráðið hervið kunngera**

**Umbøn um tilboð uppá ráðgeving í sambandi við sølu av almennum partabrøvum hjá P/F Atlantic Airways**

**P/F Atlantic Airways**
Vinnumálaráðið er farið undir fyrireikingar at selja 33% av partabrøvunum í P/F Atlantic Airways.

Vinnumálaráðið leitar sær nú ráðgeving í sambandi við komandi søluna av partabrøvunum og uppgávuna at skráseta felagið á føroyska virðisbrævamarknaðinum (ICEX). Lýst verður í føroyskum og útlendskum bløðum. Lýsing av ætlanini og listi yvir treytir/krøv frá Vinnumálaráðnum í sambandi við tílíka ráðgeving fyriliggur og verður sent til partar, ið ynskja at lata inn tilboð. Áheitan um hetta skal vera Vinnumálaráðnum í hendi innan 30. mai kl. 16.00.

**Umbøn um tilboð uppá ráðgeving í sambandi við sølu av almennum partabrøvum hjá P/F Føroya Lívstrygging**

**P/F Føroya Lívstrygging**
Vinnumálaráðið er farið undir fyrireikingar at selja 50% av partabrøvunum í P/F Føroya Lívstrygging.

Vinnumálaráðið leitar sær nú ráðgeving í sambandi við komandi søluna av 50% av partabrøvunum til ein ella fleiri íleggjarar. Tilboð ynskjast frá føroyskum og útlendskum ráðgevum. Lýsing av ætlanini og listi vyir treytir/krøv frá Vinnumálaráðnum í sambandi við tílíka ráðgeving fyriliggur og verður sent til partar, ið ynskja at lata inn tilboð. Áheitan um hetta skal vera Vinnumálaráðnum í hendi innan 30. mai kl. 16.00.

**Samband**
Keyparin av ráðgevauppgávunum er Vinnumálaráðið, ið eisini varðar av almennu fyritøkunum, ið skulu seljast. Adressan hjá Vinnumálaráðnum er: Tinganes, Postsmoga 377, FO-110 Tórshavn, Føroyar. Tlf. 356060, Fax 356065, teldupost: vmr@vmr.fo

Øll søla og tiltøk, sum skulu vera á ólavsøku ella lýsast í ólavsøkuskránni í ár, skulu nýta serligt umsóknarblað. Umsóknarblaðið fæst í Snarskivuni og á heimasíðu kommununar.

Freistin at flýggja inn umsóknarblaðið er sett til týsdagin 20. juni 2006 kl. 12.00.

Umsóknir, sum koma inn aftan á 20. juni 2006 kl. 12.00, verða ikki viðgjørdar.

**www.torshavn.fo**






## Sethús í Brekkuni 4, Tórshavn til sølu

Ognin matr.nr. 1002ap, í Brekkuni, Tórshavn er til sølu um hóskandi boð fæst. Grundøkið er 398 kvm. Húsini eru bygd í 1968, og liggja væl fyri við góðum útsýni og í sera friðarligum umhvørvi.

**Í húsunum er:**
**Loft:** Gongd, lítið goymslurúm og tvey kømur.
**Miðhædd:** 115 kvm. Durur/gongd, køkur, stova, hjúnarúm, tvey kømur og baðirúm.
**Kjallari:** Íbúð á uml. 80 kvm. við køki, stovu, hjúnarúm, lítið kamar inn av stovuni, gongd/durur og baðirúm. Harafturat er vaskikjallari við oljufýr inni. Inn av durinum er gjørt lítið amboðsrúm.
Bilskúrur (carport) og hjallur. Inngongd til hjallin er inn frá durinum í miðhæddini.

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 · 100 Tórshavn
Tlf. 311260, fax. 311261
e-mail: ge@lawfirm. fo

Tormóður Djurhuus, adv., Jógvan Páll Lassen, adv., Petur Even Djurhuus, adv., Jógvan E. Ellefsen, adv., Anna Dam, adv., Ingi Højgaard, adv.

# Lærarastarv við Kaldbaks skúla

Søkt verður eftir lærara í tíðaravmarkað starv vegna avlopstímar frá 1. august 2006. Starvið er um 24 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður ásett í september.

**Søkt verður eftir lærara, sum:**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- vera við áhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Tann, ið settur verður, skal hava lærarautbúgving. Læraralesandi, sum lúka prógv í summar, kunnu eisini søkja starvið.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sum sáttmálasett starv og verður lønt í lønarflokki 18.1-27.4. sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v., avrit av prógvum og møguligum ummælum, skulu vera fyrstalærara Ragnari J. Magnussen, Hagagøta 3 á Argjum, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 2. juni kl. 16.00.

Nærri kunning um starvið fæst við at ringja til Kaldbaks skúla, tlf. 302520 ella 515398.

**Kaldbaks skúli**
180 Kaldbak

*Kaldbaks skúli hevur komandi ár um 30 næmingar. Á skúlanum starvast 3 lærarar, sum leggja stóran dent á tann fakliga partin í undirvísingini. Í 2003 váarð skúlin høvuðsumvaldur og bygt varð afturat verandi skúla. Sera góðar hølisumstøður til næmingar og lærarar.*




**LOYSNIN!**

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
**TEL 310 411 · FARTEL 215 411**
**teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo**